SJÓNVARPIÐ

FRÍGGJADAGUR

Fríggjadag kl. 20.30

Eg og genta mín



Tað er romantikkur á skránni í hesum partinum av »Eg og genta mín«. Simon fær vitjan av Mr. Brocklebank á skrivstovuni, og biður hann um at vera við í onkrum vælgerandi arbeiði. Simon dámar hetta einki.

Simon, Samantha og Derek

Fríggjadag kl. 20.55

Rætturin at vera menniskja

10. desember í 1948 vóru tær 30 greinirnar einmælt samtyktar viðvíkjandi mannarættindunum. Hesin dagurin hevur síðani tá verið navndur mannarættindadagurin. Í hesi samtykt verður m.a. sagt, at øll fólk eiga sama lut í lívinum óansæð ættarslag, kyn ella átrúnað.

Í sendingini verður greitt frá hesi samtykt, og víst á hvussu hesar virka, ella áttu at virka, í veruleikanum.

Fríggjadag kl. 21.25

Hvønn veg er uppeftir



Margaret Avery og skemtileikarin Richard Pryor í amerikanska filminum »Hvønn veg er uppeftir?«

Richard Pryer, er hesi seinastu árini vorðin ein hin best umtókti skemtileikarin í Amerika. Hann hevur gjørt filmir sum »Tveir býttlingar aftan fyri rimarnar« og »Superman III«. Í hesum filminum hevur hann sjálvur ikki færri enn tríggjar leiklutir. Hann hevur høvuðsleiklutir sum hin skammleysi Jones. Hann leikar eisini gamli pápi Jones og haraftrat leikar hann prædikumaður, sum hevur eitt ikki heilt vanligt samband við kvinnurnar í samkomuni.

Eitt óhapp førir við sær, at Leroy verður mettur sum ein hetja, og verður hann, ein hin fyrsti at tekna seg sum lim í fakfelagnum. At hetta stendst av einum óhappi sigur hann tó einki um.

Hann hittir ta vøkru Vanettu. Hetta hóast Leroy er giftur, og áðrenn langt um leingi hevur hann tvær konur.



Í samband við jazzfestivalin, sum var í Keypmannahavn í summar, var eisini »Count Basie Band« í Tivoli og spældi til dans



ÚTVARPSUMMÆLI

Elin S. Jacobsen skrivar

Sunnudagin var fyrsti partur av útvarpsleikinum Oliver Twist. Skuldi nakað verið at funnist at, var onkur av leikarunum nakað títtmæltur. Tað kundi verið bøtt um við at lagt leikarunum betri lag á, men í aðrar mátar tykist hetta vera væl gjørdur (og væl týddur) leikur eftir søguni hjá Dickens, og vit kunnu gleða okkum til teir næstu 11 partarnar.

Útvarpið hevur havt mann í Portugal at útvarpa hondbóltsleikirnar, sum føroyingar hava tikið lut í. Einki at ivast í, at nógvir lurtarar halda tað vera rætt og rímiligt og trúliga hava lurtað. Bert eitt hjartasuff: Tá ið nú útvarpið sendir fólk til onnur lond, hevði tað so ikki verið eitt hugskot, um vit samstundis fingu okkurt annað at vita úr hesum landi. Til dømis verður forsetaval í Portugal fyrsta dagin — tað kundu vit hóskandi fingið onkrar viðmerkingar til, meðan útvarpið er á staðnum, ella okkurt annað . . .

Mikukvøldið var samrøða við ríkisumboðsmannin, sum greiddi frá danska uppleggjinum til samráðingar um komandi blokkstuðulsskipan. Tað gjørdi hann eisini væl og virðiliga. Men eg sat og argaðist inn á interviewaran, sum við hálvgum firtnum, hálvgum grenjandi tónalag spurdi, um Danmark nú fór at sleppa okkum upp á fjall, og noyddi soleiðis ríkisumboðsmannin inn í eina uggandi formyndararollu.

Tónleikasendingarnar eru nógvar í útvarpinum, og tað, at so nógv ymisk fólk verða biðin um at leggja tær til rættis, ger tær fjølbroyttar. Eg havi hug at nevna fyrrapartsløgini hjá Mikkjali Helmsdal yngra fyri tað góða: Hann fer víða í tónleikaheiminum og fær altið ymisk føroysk løg við, og so tí hann er ein av teimum, sum ikki leggur í at leggja seg eftir tí skaputa »disko-føroyska«, sum so mong eru um at sálast av — ein spyr seg sjálvan: hvør heldur tað vera smart?

Langt er ímillum sendingarnar »Leikur og lestur«, tó at mangt skuldi verið at trivið í har.

Barnaútvarpið hevur havt góðar sendingar í seinastuni. Stuttligt var at hoyra prát við børn úr Porkeri herfyri. Bæði Oddvá og børnini høvdu fyrireikað seg væl, og tá spyrst sum oftast okkurt gott burturúr.



SJÓNVARPSUMMÆLI

Johan Samuelsen skrivar

Vit sóu nakað av føroyskum dansi av Velbastað í sjónvarpinum á føstulávint, og sigast má, at tað er ikki júst hvønndagskostur hjá SVF at bjóða síggjarum tess sovorðið tilfar. Hóast onkur í sjónvarpinum, eftir senditíðini at døma, heldur, at sovorðið tilfar er ikki tað, sum hóskar allarbest á skerminum, so meti eg, at føroyskur dansur eigur at sleppa meiri framat í sjónvarpinum. Eitt kvæði av og á tola vit saktans!

Einki hevði verið meiri natúrligt, enn at sjónvarpið fór landið runt og vitjaði ymsu dansifeløgini og fekk tey at sýna fram góðan dans og dansispøl. Eitt sovorðið tiltak hevði uttan iva verið til stóra gleði fyri mong, í fyrstuni kanska mest fyri tað eldra fólkið, men hevði uttan iva eisini verið við til at kveikt áhuga hjá tí yngra ættarliðinum fyri føroyska dansinum, og tá hevði ikki verið so lítið vunnið. Hesin mentunararvur, sum dansurin er, eigur at verða røktur av SVF í ávísan mun, og ikki sum higartil, nærmast tagdur í hel. Dansurin er enn ein livandi partur av okkara mentan og eigur at virðast sum so.

Um tað so skal vera so »uppstáplað«, at gud og hvør maður skal vera í føroyskum klæðum fyri at fara upp á gólv, er so nakað heilt annað — til framsýningar er tað í lagi, men annars er tað bert ein forðan við hasi klædnadraktini, sum fær mangan nútíðarunglingin at halda seg burtur frá hesum frálíka dansi, sum skuldi verið fyri øll!

Sendingin um vælumtókta danska sjónleikaran Poul Richardt var góð. Tað, sum var so frálíkt við hesi minnissending, var, at maðurin sjálvur við kutum úr ymsum sendingum, gjørdar av danska sjónvarpinum igjøgnum tíðina, m.a. í Lørdagshjørnet, greiddi frá egna lívi sínum á ein sera »sjarmerandi« hátt, saman við filmkutum úr hansara mongu góðu filmum. Sendingin snúði seg um Poul Reichardt sum sjónleikara og ikki sum privatpersón, og tó, hví bert greiða frá, tá ið tað rekur við lívinum hjá kendum fólkum, sum hjá honum, og ikki fylgja manninum, tá ið tað fór at reka ímóti, hann fekk sanniliga sítt at striðast við móti endanum, men so eiðasørt at vit fingu eitt orð at vita um hesi seinastu árini av lívi hansara, og hvussu hann megnaði at spæla hesa »rolluna« á skuggasíðu livsins. Tað hevði ikki verið minni áhugavert.

Samrøðan í Glugganum við nýggja undirvísingarstjóran í musikki, Ólav Hátún, var í lagi. Men spyrjarin ger sær ikki nóg stóran ómak við spurningunum, er ov stutt og knøpp í orðavali, og setir seg ikki nóg væl inn í tað, sum spurt verður um; hon eigur at minnast til, at hon spyr Føroya fólks vegna, og vit hava krav uppá at fáa at vita hvat gongur fyri seg úti um landið á hesum øki, hvar undirvíst verður o.s.fr. Hví ikki skifta orð við næmingar og lærarar, sum higar eru komnir at undirvísa í musikki, so at vit bæði kundu hoyra og síggja, hvat ið hendir á hesum mentunarøki?

Eisini bleiv m.a. greitt frá, at tiltakið kostar føroysku skattaborgarunum 3 mill. kr. og 23 musikklærarar við hægstu útbúgving taka sær av hesi undirvísing — hetta gevur góðar 130.000 kr. í part um árið. Man nakar høgtlærdur musikari tíma at koma til Frøoya úr Stokkhólmi ella London fyri at læra føroyingar at spæla uppá eitthvørt ljóðføri fyri slíka hungursløn?